

## Valur framvegis oddalið

Tað gongur væl hjá føroyska landsliðsmálverjan Randi Wardum og liðfeløgunum í Vali í løtuni. Týskvøldið vóru tær á vitjan hjá Þór/KA, sum undan dystinum lá á sætta plássinum. Randi Wardum vardi málið hjá gestunum, sum vunnu 3-1. KR, sum liggur á øðrum plássi, vann heili 4-0 á Keflavík, og tískil eru tað framvegis trý stig, sum skilja Val og KR í bestu íslendsku kvinnudeildini í løtuni.
Komandi týskvøld vitjar Valur hjá HK/Vikingur, sum liggur á næstaftasta plássinum – nummar níggju.

## U17 væl frá byrjan

Føroyska U17 landsliðið tekur í hesum døgum lut í Aberdeen International Football Festival, har feløg kring allan heimin hittast. Kappingin verður nýtt sum fyrireiking til NM, sum byrjar í næstum. Fyrsti dysturin var á skránni fyrrapartin í gjár, og vunnu føroysku dreingirnir trygt við 3-0 á norska Stavanger. Gilli Sørensen, málverjin Teitur Gestsson og Hallur Hansson stóðu fyri málunum. Gestsson skoraði upp á brotsspark. Seinnapartin leikti U17 málleysan javnleik móti Cove Rangers. Skotska liðið var leikliga omaná, men megnaðu ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Føroysku dreingirnir vóru hinvegin vandamiklir upp á mótálop. U17 spælir triðja og seinasta dystin í bólkaspælinum seinnapartin í dag. Tá er mótstøðuliðið Hetland.

# Manchester City tystir




*Nú byrjar eitt nýtt tíðarskeið við einum nýggjum venjara, sum annars hevði sína bestu tíð sum fótbóltsspælari í Manchester United, nevnliga Mark Hughes. Hann hevur eisini spælt á walisiska landsliðnum, sum var í Føroyum í 1993*

*Mynd: Polfoto*

**Manchester City er kanska eitt væl kent felag, men ein kemur ikki uttan um, at teir hava ikki vunnið nakað nevnivert í ensku kappingini síðani 1976**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

28. februar 1976 er ein søguligur dagur í søguni hjá Manchester City. Henda dagin vunnu teir tað seinasta heitið teir hava vunnið í enskum fótbólti. Henda dagin var finalan í Liga Cup kappingini. 100.000 áskoðarar sóu Manchester City vinna 2-1 á Newcastle United. Peter Barnes og Dennis Tueart skoraðu málini fyri Manchester City, Alan Gowling skoraði fyri Newcastle.

Í 2002 vann City næstbestu deildina, men higartil hava teir hugt langt eftir Premier League-heitinum, umframt FA Cup og Liga Cup heitunum.

### Onnur nøvn

Manchester City hevur eins og hitt kenda liðið í Manchester, Manchester United, broytt navn. City hevur enntá broytt navn tvær ferðir í søguni.

Í 1880 var felagið stovnað sum St. Marks at West Gorton. Í 1887 broytti felagið navn til Ardwick F.C. Ardwick var millum feløgini, sum stovnaði ensku 2. deild í 1892. Sjey ár seinni, í 1894, broytti felagið aftur navn, og hevur felagið hildið fast við navnið til hendan dag, Manchester City.

Felagið hevði fíggjarligar trupuleikar tá, og var tað høvuðsorsøkin til navnaskiftið. Í 1899 eydnaðist tað City at vinna 2. deild, og sluppu teir at royna seg í bestu fótbóltsdeildini um aldarskiftið.

Tað gingu tó nøkur ár, áðrenn liðið stabiliseraði seg. Teir fluttu niður aftur, men í 1903 eydnaðist tað aftur felagnum at vinna 2. deild, og nú sá ljósari út, fyri fyrst.

Í 1904 eydnaðist tað City at vinna FA Cup finaluni við einum 1-0 sigri á Bolton Wanderers, og gjørdist hetta fyrsta heitið hjá felagnum. Sama kappingarár gjørdist City nummar tvey í liguni.

Úrslitini kundu verða rættiliga ógvuslig fyrstu árini, og setti City bæði tey jaligu og neiligu metini fyrstu árini.

Í 1895 vann felagið sín størsta sigur í liguni, tá City vann 11-3 á Lincoln City. Í 1890 vann felagið sín størsta sigur í FA Cup, tá teir vunnu 12-0 á einum liði, sum æt Liverpool Stanley. Størsti ósigurin í liguni er frá 1906, tá City tapti 1-9 ímóti Everton. Størsti ósigurin í FA Cup er ímóti Preston North End. Í 1897 tapti City Manchester City 0-6 ímóti Preston.

### Muturgøla

Størri skaði enn so skuldi henda í 1906. Alec Leake hjá Aston Villa meldaði Billy Meredith og fleiri aðrar Manchester City spælarar til enska fótbóltssambandið fyri at mutra seg, soleiðis, at Aston Villa skuldi tapa við vilja til Manchester City. Billy Meredith og hinir spælarnir noktaðu fyri hesum, men FA valdi at trúgva Alec Leake, og gav FA Meredith og fleiri øðrum City-leikarum eitt leikbann uppá 18 mánaðir. Tal-